# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Altíð serligt at vinna

**Hann hevur roynt tað áður í bæði Noregi og Danmark, og um vikuskiftið bleiv hann steypavinnari í útlandinum á triðja sinni. Bárður B. Mikkelsen og Marienlyst vunnu trygt 3-0 í finaluni**

FLOGBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*



*Hóast tíðin til flogbóltin ikki longu er eins góð, so tekur Bárður B. Mikkelsen tingini, sum tey koma. So tað er ikki óhugsandi, at hann eisini verður á landsliðnum, tá oyggjaleikir standa fyri framman í summar*

Føroyski Bárður B. Mikkelsen bleiv sunnudagin danskur steypavinnari í flogbólti, tá ið hann saman við felagi sínum, Marienlyst, vann tryggan 3-0 finalusigur á Aalborg HIK. Settúrslitini vóru 25-16, 25-17, 25-20.

### Altíð nakað serligt

Bárður B. Mikkelsen hevur tvær ferðir áður verið steypavinnari uttanfyri føroysku landoddarnar. Í 2002 bleiv hann norskur steypavinnari við Tromsø, meðan hann í 2006 bleiv danskur steypavinnari við Holte IF. Hvussu er tað so at gerast steypavinnari á triðja sinni?

- Tað er altíð deiligt at vinna, hóast vit fingu lítla mótstøðu hesuferð. At vinna eina finalu er altíð nakað serligt, sigur Bárður, sum peikar á, at dystirnir ímóti Aalborg HIK altíð plaga at vera tættir og spennandi, men at mótstøðuliðið hesaferð ongantíð kom í gongd, samstundis sum at teir í Marienlyst spældu sera væl.

### Veteranur

31 ára gamli Bárður Mikkelsen hevur verið partur av bæði liga- og landsliðsflogbólti í nógv ár, og tað var eisini sum veteranur, hann luttók í steypafinaluni.

- Eg kom ikki serliga nógv inn á vøllin. Mín rolla í ár er at vera ein av teimum royndu kreftunum á ungum liði, sigur Bárður.

Finalan varð leikt í Odense Idrætshal, har gott flogbóltslag var alt vikuskiftið.

- Her í Danmark halda tey ein veruligan steypafestival, har allar deildir spæla steypafinalu sama vikuskiftið, og síðan endar við mansfinalu sunnudag, sigur Bárður, og leggur hálvflennandi afturat, at dysturin hesaferð ikki bleiv vístur beinleiðis í sjónvarpinum, av tí at tað fall so óheppið, at HM-endaspæl í hondbólti verður leikt nú um dagarnar.

### Stille og roligt

Bárður komin nakað væl upp í árini, og vanliga eru leikarar við at rigga av á hægsta sigi, tá ið teir eru komnir í handan aldurin. Bárður tekur tað tó sum tað kemur.

- Eg havi avtalu við Marienlyst hetta kappingarárið út, og so mugu vit fáa vit at síggja. Soleiðis er tað eisini við landsliðnum; eg havi ikki givið teimum nakað svar enn, sigur Bárður og sigur at enda, at hann ikki hevur ætlanir um at flyta heim til Føroya ella spæla flogbólt her.

# Arbeiða knallhart móti málinum

**FSF-forsetin sigur, at starvsnevndin framvegis arbeiðir eftir sama leisti í royndini at finna best møguliga landsliðsvenjaran**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Høgni í Stórustovu, FSF-forseti, sigur, at hann sum so ikki hevur nakrar viðmerkingar til málið um, at Colin Calderwood er settur í starv sum venjari hjá Newcastle. Heldur ikki, hóast hesin segðist vera maðurin, sum stóð ovastur á ynskislistanum hjá FSF.

- Tá talan er um nøvn og persónar, fái eg ikki gjørt nakra viðmerkingar yvirhøvur.

Men hevur setanin hjá Newcastle av Colin Calderwood ikki órógvað tilgongdina?

- Eg havi ongar viðmerkingar til tann partin. Eg kann bara staðfesta, at vit í nevndini framhaldandi arbeiða knallhart fyri at seta rætta venjaran til landsliðið, sigur Høgni í Stórustovu.

- Og tað arbeiðið gongur so framvegis sína gongd. Beint nú kanst tú siga, at vit fara til hálvleiks, tí sjálvur skal eg av landinum í øðrum ørindum í morgin. Men vit arbeiða framvegis eftir sama leisti, og tað ganga vónandi ikki alt ov nógvir dagar, áðrenn vit kunnu boða frá okkara endaligu niðurstøðu, sigur Høgni í Stórustovu.

Sambært enska this is Nottingham er framvegis møguleiki fyri, at Colin Calderwood verður føroyskur landsliðsvenjari. Setanin í Newcastle er galdandi hetta kappingarárið, og enska blaðið veit at siga, at ein millumloysnt møguliga kann gerast, soleiðis at Calderwood kortini verður landsliðsvenjari, men at tann setanin ikki tekur við fyrr enn í juni mánaði.



*Colin Calderwood varð í gjár settur sum venjari hjá Newcastle. Enn er ikki greitt, hvussu verður við føroyska landsliðsvenjarastarvinum*

## Tem skiftir til Søllerød-Vædbæk

**Tem Hansen skal komandi hálva árið spæla við Søllerød-Vædbæk í triðbestu donsku deildini**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Hann kann verða við til at bjarga okkum sætið í deildini. Venjararnir hildu hann vera áhugaverdan, og so gjørdu vit eina avtalu, nú hann ikki longur er bundin at Lyngby.

Soleiðis sigur Claus Larsen, stjóri í Søllerød-Vædbæk, við bold.dk, nú tað er greitt, at Tem Hansen komandi hálva árið skal spæla við felagnum.

Søllerød-Vædbæk liggur í løtuni á aftasta plássinum, fýra stig frá bjargingini, í 2. division øst.

## Menn og kvinnur ymisk úrslit

HONDBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Kvinnurnar rendu seg í sítt fyrsta tap hetta kappingarárið, tá VHC/Vidar basti føroysku kvinnunum 17-16.

Føroysku kvinnurnar vóru annars á odda 13-8 í steðginum, har serliga álopsparturin hevði riggaði ógvuliga væl. Tað sama kann ikki sigast um seinna hálvleik, tá tað gingu út ímóti tíggju minuttum, áðrenn ÍF Føroyar fekk fyrsta málið.

Hjá monnum gekk nakað væl betri. Hesir vunnu 35-17 eftir at hava verið á odda 16-6 í steðginum. Dysturin var ein uppgerð millum topp og botn í deildini, og tað sást aftur á øllum brøgdum.

Sum dysturin leið kom Rødovre nakað betri við, men ÍF Føroyar vísti styrki og serliga Magnus Poulsen á strikuni stóð seg væl. Sigurin, sum av sonnum staðfesti munin millum topp og botn, er eisini ársins størsti hjá ÍF Føroyum.

Menninir hava nú 19 stig fyri 11 dystir og liggja fremstir. Nærmastu kappingarneytarnir hava 14 stig fyri 8 dystir.